## Klinsmann filmaði mest

Í Onglandi kjakast tey í hesum døgum nógv um, spælarar filma í fótbóltsdystum. Heimasíðan talkSPORT hevur gjørt ein atkvøðugreiðslu millum sínar lesarar um, hvør spælari hevur filmað mest í ensku Premier League. Týski álopsspælarin Jurgen Klinsmann, sum spældi fyri Tottenham, var tryggur vinnari í atkvøðugreiðsluni. Í hølunum á honum koma Steven Gerrard, Didier Drogba, Cristiano Ronaldo og David Ginola.



## Mótbrekka beinanvegin

– Vit vóru væl uppsettir undan dystinum, men tað kiksaði frá byrjan hjá okkum. Eg veit ikki, hvat hendi, men hatta var ikki ein góður fyrri hálvleikur, segði høgri bakkur á føroyska liðnum, Jónas Þór Næs.

– Tað fyrsta málið oyðilegði nógv fyri okkum. Vit fingu mótbrekku beinanvegin, og so var tað ikki lætt at koma inn í dystin. Nú mugu vit tosa um tað og seta orð á, hvat gekk galið, so vit kunnu gera tað betri mikudagin, tá vit skulu gera ein góðan vørr.

# Ótrúliga skuffaður



Símun Samuelsen

Sær 3-1 penari út, enn tað var?

– Hetta var øgiliga keðiligt fyri okkum, tí vit vildu gera ein góðan innsats. Eg vil siga, at bæði eg og alt liðið vóru øgiliga vánaligir í fyrra hálvleiki, segði Símun Samuelsen eftir dystin.

– Vit tóku luftina úr okkum sjálvum, tí vit lótu teir fáa kjansin at skora beinanvegin. Tað er líkamikið, hvat tosað verður um áðrenn, um tað ikki eisini verður gjørt inni á vøllinum. Vágbingurin, sum dagliga spælir í íslendska felagnum Keflavík, helt ikki nakra umbering vera fyri, at so illa gekk í hond fyri steðgin.

– Vit vita, at tað hendir, at vit kunnu hava ein ringan dag. Men serliga eftir fyrra hálvleik var eg ótrúliga skuffaður av mær sjálvum. Vit kundu skift allar 11 út, um tað var loyvt, segði hann.

– Í seinna hálvleiki spældu vit betri, tá teir kanska tóku tað meira róligt, men 1-1 var í ordan eftir steðgin. Nú skulu vit í øllum førum inn at gera tað dupult so gott ímóti Litava mikudagin.

*-hil*

**Símun Samuelsen var á ongan hátt nøgdur um avrikið hjá sær og liðnum leygardagin**

Mynd: Polfoto

### Altíð ímóti yvirmaktini

Abraham Løkin, sum er annar av hjálparvenjarunum, helt tað vera torført at finna orð at seta á tað, hann hevði sæð frá føroyska liðnum á UPC Arena í Graz leygarkvøldið.

– Vit áttu at gjørt tað betri, men tað fingu vit bara ikki hesa ferð. Tú situr við einari eitt sindur tómari kenslu eftir ein slíkan dyst, tí upp á ein máta virkaðu vit eitt sindur tamir, helt hann.

– Sjálvandi spældu vit á útivølli í Eysturríki ímóti einum liði, sum hevur viðgongd fyri tíðina. Teir hava eitt fantastiska gott lið, og vit kanska vænta ov nógv av okkum sjálvum undan einum slíkum dysti.

Samstundis ásannaði hann, at tað altíð er torført hjá Føroyum at bjóða teimum størru av:

– Eitt føroyskt landslið má altíð stríðast ímóti einari yvirmakt, og viðhvørt gongur tað betri og viðhvørt ikki so øgiliga væl. Akkurát hesa ferð var tað so ikki tað allarbesta, vit hava sæð, segði Abraham.

*-hil*

# Símun er nú limur í 25 felagnum

**Vongspælarin í Keflavík er tann 31. føroyingurin, sum 25 ferðir hevur umboðað føðilandið**




Jákup Mørk

Leygarkvøldið helt ein av føroysku spælarunum silvurbrúdleyp saman við landsliðnum. Tað var Símun Samuelsen, sum fyri 25. ferð umboðaði føðilandið í landsdysti í fótbólti.

Símun var á vøllinum allar 90 minuttirnar, og tað er góð staðfesting av, hvussu leikluturin hjá Símuni hevur verið nógvu tær seinastu ferðirnar.

Eitt mál er Símun skrásettur fyri at hava skorað á landsliðnum. Tað var 8. oktober í 2005, tá ið Føroyar í Tel Aviv taptu 2-1, at Símun úr ógvuliga spískum í høgru sendi bóltin í ísraelska málið.

Fyrsti altjóða skrásetti landsdysturin hjá Føroyum varð spældur í Akranesi 24. august í 1988. Símun Samuelsen er tann 31. føroyingurin, sum røkkur 25 landsdystum.

Vágbingurin í Keflavík, sum er føddur 21. mai í 1985 og tískil er 24 ára gamalur, var fyrstu ferð á landsliðnum 27. apríl í 2003, tá ið Føroyar á Svangaskarði vunnu vinardyst ímóti Kasakstan 3-2. Henrik Larsen var venjari, og fýra spælarar vóru fyri fyrstu ferð á landsliðnum í hesum dystinum. Hinir vóru Atli Danielsen, Jann Ingi Petersen og Jónhard Frederiksberg. Jann Ingi var millum teir fyrstu ellivu, meðan allir hinir vórðu skiftir inn.

Símun Samuelsen, sum fekk sína fótbóltsuppaling í VB, umboðaði í 2003 GÍ. Í fyrsta landsdystinum loysti hann Jákup á Borg av.

Í nógvum teimum fyrstu landsdystinum var Símun skiftisspælari. Ofta varð hann skiftur inn, og tá ið hann ikki varð skiftur inn, so varð hann skiftur út. Tað tóktist sum um, at hann hevði ilt við at vísa síni evni, tá ið hann umboðaði Føroyar soleiðis, sum hann gjørdi í feløgunum, sum hann umboðaði.

Tey seinastu árini hevur Símun verið mest sum fastur maður á landsliðnum, og tað ber boð um, at avrikini hava verið støðug.

Símun Samuelsen spælir nú í Keflavík, har hann er fastur maður í vinstru síðu, og har hann verður roknaður sum ein lyklaspælarunum.